# Ungir menn fara í land av línubátunum

**Tað er ikki líka so áhugavert longur at sigla við føroyskum línubátum, sum tað var fyri tveimum árum síðan, tá ið línuflotin helst hevði sínar bestu dagar nakrantíð**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit síggja eina ábending um, at ungir menn, sum sigla við línubátum, fara í land og velja heldur at fara í læru. Orsøkin er, at tað gevur ikki tað sama at vera línumaður í dag, sum fyri bara tveimum árum síðan. Í dag skalt tú vera umborð at kalla hvønn túr, um tú skalt tjena 300.000 krónur í eitt ár. Ert tú fleiri túrar í landi gjøgnum árið, verður inntøkan munandi minni.

Tað sigur Tórleif Sigurðsson, sum er reiðari á línubátunum, Pison, Kvikki og Froya, sum er gamli Jógvan S.

Hann eigur í Pison og Kvikki og er útgerðarmaður hjá Froya.

Aftrat hesum er eisini ein útróðrarbátur, sum hevur egningarmaskinu og ein, sum í løtuni roynir við snellu.

## Fara í læru

Reiðarin vísir á, at ungir menn eru farnir í land og hava í staðin valt at fara í læru sum handverkarar av ymiskum slagi.

- Eg trúgvi, at fleiri línuskip í ár koma niður ímóti teimum 10 miljónum krónunum í veiðivirði, og tað gevur ein manningarpart, sum liggur um einar 300.000 krónur fyri alt árið. Línuskipini eru nógvar dagar í sjónum; tey gera millum 22 og 25 túrar um árið. Eru menn í landi onkran túrin inn ímillum, tjenar ein maður líka so nógv í einum vanligum arbeiði uppi á landi – og tá kann hann sova í síni egnu song hvørja nátt, sigur Tórleif Sigurðsson.



- *Alt er til sølu, um prísurin er hin rætti, men Pison er ikki seldur, staðfestir reiðarin, Tórleif Sigurðsson*

# Pison er ikki seldur

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri hoyrdu vit graml um, at línubáturin, Pison, skuldi vera seldur, men tað er ikki rætt.

- Pison er ikki seldur, staðfestir reiðarin, Tórleif Sigurðsson í morgun.

Spurdur, hvussu søgurnar um møguliga sølu eru farnar at ganga, sigur reiðarin:

- Tað er rætt, at onkur hevur víst skipinum áhuga, og tá hava vit sagt, at alt er til sølu, um prísurin er hin rætti.

Tórleif Sigurðsson dugir ikki at siga, um línubáturin verður seldur í nærmastu framtíð.

- Nei, tað kann eg einki siga um í løtuni, leggur hann aftrat.

# Línuflotin er eink

**Í 2003 fiskaði línuskipið, Pison í Klaksvík, fyri 22,4 miljónir krónur. Í ár er veiðivirðið minni enn ein helming av hesum. – Ein línubátur skal helst ikki skylda meira enn einar 6-7 miljónir krónur, soleiðis sum gongdin er í løtuni, sigur reiðarin, Tórleif Sigurðsson**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað gongur upp og niður í fiskivinnuni. Soleiðis hevur tað altíð verið, og soleiðis fer tað altíð at verða.

Í 2003 hevði línuskipið, Pison í Klaksvík, sítt besta ár nakrantíð, og lítil ivi man vera um, at skipið hetta árið setti øll met.

Pison fiskaði í 2003 fyri 22,4 miljónir krónur, og tað er helst meira, enn nakar annar føroyskur línubátur áður hevur fiskað fyri í eitt ár.

Tann eina túrin í august mánaði í 2003 seldi skipið fyri meira enn 2 miljónir krónur. Hetta var ein av góðu Føroyabanka-túrunum, sum skipið gjørdi hetta heystið. Fiskurin var nógvur, og prísirnir vóru methøgir.

Vanliga er august mánaði vánaligur til fiskiskap hjá línubátunum, men hetta árið royndist hesin mánaður betur enn aðrir.

Men skjótt kann vendast í fiskivinnuni, tá ið tað gongur niður á bakka. Longu árið eftir, at Pison setti øll met, fiskaði skipið fyri 12,6 miljónir krónur (2003) og í ár, nú árið er liðugt, er veiðivirðið slakar 11 miljónir krónur.

## Hongur saman

Tórleif Sigurðsson er reiðari á Pison og Kvikki, umframt at hann eisini er útgerðarmaður hjá Froya, sum er fyrrverandi Jógvan S.

Fiskiskapurin hjá Kvikki hevur vanliga verið lakari enn hjá Pison, men í ár hevur Kvikk munin við einum veiðivirði, sum liggur umleið hálva aðru miljón hægri enn hjá Pison.

Tórleif Sigurðsson vísir á, at veiðivirðið hjá Pison í ár er minni enn 50% av veiðivirðinum í 2003.

- Kortini hongur raksturin hjá skipunum saman, leggur hann aftrat.

Reiðarin veit at siga, at Klakkur, sum er eitt annað línuskip í Klaksvík, í ár hevur fiskað fyri 16,3 miljónir krónur, og hann heldur, at Klakkur avgjørt





Kaupthing Bank:

# Ein risi á føroyska

**- Við eini egingogn upp á 18 miljardir danskar krónur, verður Kaupthing nógv tann størsti bankin á føroyska marknaðinum, sigur Petur Holm, stjóri**

*- Deildin hjá Kaupthing í Føroyum verður før fyri at loysa uppgávur, ið føroysku peningastovnarnir higartil ikki hava megnað, sigur Petur Holm, stjóri*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

VINNULÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið sáttmálin millum Føroyar og Ísland kemur í gildi til várs, verður virksemið hjá Kaupthing í Føroyum umskipað,